

VW Golf Plus er næstan 10 cm hægri enn vanligi Golfurin
Mynd: Jens Kristian Vang



*Nógv er gjørt burtur úr rúmligheit og liðiligari innrætting*

# Stórt pluss til VW Golf

**Volkswagen víðka nú modellskánna hjá Golf-inum við Golf Plus, ið er rúmligari, hægri at sita í og liðiligari inn-rættaður. Sjálvt størstu persónar sita eins væl bæði framman og aftan**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin*

VW Golf hevur seinastu 30 árini verið leiðarin í sínum klassa, og tá fleiri av kappingarneytunum gera nógv burturúr rúmligheit og liðiligari innrætting, hava Volkswagen so valt at gera Golf Plus sum enn eitt tilboð. Golf Plus er næstan 10 cm hægri enn tann vanligi Golfurin.

Hóast Golf Plus sær nakað annarleiðis út, og er annarleiðis innrættaður, er eingin ivi um, at hann er ein VW Golf.

Instrumentborðið er nýtt, og kabinan er annarleiðis innrættað. Baksetrini kunnu flytast aftur og fram, soleiðis at man kann velja ímillum betri beinpláss aftan ella størri viðførisrúm. Við baksetrunum løgd niður er viðførisrúmið 1450 litrar.

Á trygdarøkinum kunnu vit nevna, at umframt ESP (Electronic Stabilisation Program) og seks airbag hevur Golf Plus LED-baklyktir, og hann fæst eisini við bixenon-forlyktum, ið snara við, tá bilførarin snarar rattinum.

Eins og Golf verður Golf Plus eisini gjørdur í útgávunum Trendline, Comfortline og Sportline. Síðuspeglini hava innbygd blunkljós.

Í fyrstu atløgu verða fýra motorar at velja í millum, tveir bensin og tveir TDI diesel.

Bensinmotorarnir verða: 1,4 litur við 75 hk, og 1,6 litur FSI við beinleiðis innspræning og 115 hk, og turbodiesel motorar verða: 1,9 litur TDI við 105 hk, og 2,0 litur TDI við 140 hk. Seinni koma aðrir motorar við í skránna. Allir motorarnir lúka tey strongu EU4-krøvini til umhvørvisvernd.

Prísirnir byrja við kr. 216.000 fyri ein 1,4 litur bensin við 75 hk, og dieselprísirnir byrja við 262.000 fyri ein 1,9 TDI við 105 hk.

Golf Plus kunnu síggjast og roynast á Bilasøluni hjá Øssuri og Schumann í Hoyvík.


## VIT RUDDA HILLARNAR



**Audi A4**
1,6 árg 06/97 km 81.000
Útgerð: El-rútar, el-spegl, sentrallás og sleipikrók.
*Fyrr kr. 115.000,-* **Nú kr. 99.000,-**



**VW Passat 1,9 TDI 130HK Tiptronic**
árg 07/01 km 193.000 Útgerð: El-rútar, el-spegl, AC, fjarðst. sentrallás, CD o.a.
*Fyrr kr. 198.000,-* **Nú kr. 150.000,-**



**VW Bora 1,6**
árg 07/99 km 79.000
Útgerð: Sentrallás, el-rútar og el-spegl
*Fyrr kr. 118.000,-* **Nú kr. 99.000,-**



**VW Passat 1,9 TDI**
árg. 02/99 km 202.000
Útgerð: El-rútar og sentrallás.
*Fyrr kr. 128.000,-* **Nú kr.105.000,-**



**VW Transporter 2,4 Diesel**
árg. 12/97 km 71.000
Útgerð: El-rútar, el-spegl, el-sóltak og sleipikrók.
*Fyrr kr. 115.000,-* **Nú kr. 99.000,-**



**Citroen Xantia 1,9 T-diesel**
árg. 09/95 km 165.000
Útgerð: CD-spælara/boks, el-rútar framman.
*Fyrr kr. 69.000,-* **Nú kr. 50.000,-**



**Citroen Xantia 1,9 T-diesel**
árg. 09/96 km 181.000
Útgerð: sentrallás og el-rútar framman.
*Fyrr kr. 58.000,-* **Nú kr. 45.000,-**



**Skoda Octavia 1,6i**
árg. 05/00 km 103.000
Útgerð: AC, sentrallás, el-rútar, el-spegl.
*Fyrr kr. 99.000,-* **Nú kr. 84.000,-**

NÓGV GÓÐ
**TILBOÐ**

**Bilasølan**
**Vegurin langi, 315354**
**www.bilasolan.fo**